BALSLEV 100 ár:

# Stórfingin føðingardagur í Hoyvík




100 ára føðingardagur hjá Balslev í Hoyvík

**Leygardagin 19. august var ein stór móttøka í Hoyvík, har yvir túsund fólk komu í 100 ára føðingardag hjá Balsev. Nógv var gjørt burturúr, og nakað var fyri bæði vaksin og børn**

MÓTTØKA

*Myndir: Tróndur S. Olsen / Theodor E. Olsen*

Hundrað ára føðingardagurin hjá Balslev í Hoyvík leygardagin 19. august fekk sera góða undirtøku. Yvir túsund fólk leitaðu sær í góðveðrinum inn á økið, sum var gjørt klárt í samband við føðingardagin. Har vóru bæði uttandura og innandura tiltøk.

Tónleikatiltøk vóru framførd av t.d. Kim Hansen og Havnar Hornorkestri.

Bæði børn og vaksin hugnaðu sær í hoppiborgunum og øðrum sum var sett upp til ymiskar kappingar.

Inni í Høll C var ein flott framsýning við gomlum myndum, sum Birgar Johannesen hevði sett upp.

Góði maturin setti sín serliga dám á føðingardagsveitsluna.




*Ein av fyrrverandi starvsfeløgunum hjá Balslev, Poul Michelsen, heldur røðu*



*Vinstru megin Eyðun Hansen, ein av stjórunum hjá Balslev*



*Bent á Lava, forstjóri, og Adam Madsen, nevndaformaður hjá Balslev. Uttast til vinstru: Alma á Lava, dóttir Bent á Lava*



*Sámal Rubeksen arbeiddi í mong ár hjá Balslev*



*Heðin Petersen og Sjúrður Olsen, starvsfólk hjá Balslev*



*Nógv varð gjørt burturúr føðingardegnum*



*Stór myndaframsýning sum Birgar Johannessen setti upp í sambandi við føðingardagin*



*Børnini hugnaðu sær í hoppiborgunum*